# Vunnu uttan Ioanu

*VÍF megnaði at basa Tjaldrinum í einum dysti, sum á pappírinum átti at verið ein avgreiðsluspurningur, men sum kortini vísti seg at gerast nógv torførari enn ætlað*

JÁKUP MØRK

Tjaldur-VÍF 17-18 (6-10)

VÍF hevur hetta kappingarárið staðið seg sera væl í landskappingini, har tær m.a. eru einasta liðið, sum hevur megnað at bast annars suverenu stjørnunum úr Klaksvík.

Hesu ferð gekk leiðin til Runavíkar, og mett eftir metsigrinum í Vestmanna, var eingin ivi um, at hesin dysturin skuldi kasta tvey stig burtur av sær.

Tað gjørdi hann eisini, men leingi stóð nógv á hjá vestmenningunum, sum tó kortini megnaðu at toga sigurin heim í evstu løtu.

### Gekk sum ætlað í fyrra

Eftir fyrsta hálva tíman var tó lítið, sum bendi á, at talan skuldi gerast um ein javnan og spennandi dyst.

Ioana Rápa, sum fyrr í ár fekk álvarsligan skaða, er framvegis ikki komin rættuliga fyri seg, og tískil hevði hon sett seg sjálvan á beinkin sunnudagin. Hetta sá tó ikki út til at nerva lið hennara, sum sum allan fyrra hálvleik hevði tamarhald á støðuni, soleiðis at tær kundu fara til hálvleiks við eini tryggari leiðslu.

Tjaldur megnaði tó at berja seg inn aftur í dystin, og tá seinni hálvleikur var hálvrunnin, stóð brádliga á jøvnum millum liðini.

Heimaliðið megnaði eisini at leggja seg á odda, tá einir fimm minuttir vóru eftir at leika, men tá hevði toppskjúttin úr Vestmanna fingið nokk.

Ioana setti seg sjálvan á vøllin eina løtu, beinan vegin syrgdi hon fyri, at tað aftur stóð á jøvnum. Tá so Tjaldur lítla løtu seinni brendi eitt brotskast og harumframt fekk ein leikara útvístan, var bólið reitt hjá VÍF, og kundu tær sostatt loksins tryggja sær tvey stig, sum seinni kunnu vísa seg at verða sera týdningarmikil.

### Stríðast um silvurkrónurnar

Í øllum førum er VÍF, saman við Neistanum og Kyndli, partur í stríðnum um silvurkrónurnar. Í løtuni eru tær helst liðið, sum liggur best fyri í so máta, men hinvegin skal havast í huga, at teimum enn væntar ein dyst móti Stjørnuni.

Tveir dagar undan tí dystinum, skulu tær á heimavølli leika móti Kyndli, og hesir báðir dystirnir kunnu væl vísa seg at fáa alstóran týdning fyri, hvar silvurmerkini skulu heingjast, tá avtornar.

Tjaldur hevur nú helst mist allar vónir at fáa nakað stig burturúr kappingini, men niðurflyting verður so eingin hetta árið, tí StÍF longu áðrenn kappingarársbyrjan boðaði frá, at tær tóku liðið úr kappingini.

Tjaldur verður tí framhaldandi at síggja í fremstu deildini komandi ár, og hetta var eisini setningur teirra, tá árið byrjaði, men helst høvdu tær vónað, at okkurt stigið fór at spyrjast burtur teimum 20 dystunum.

Enn eru kortini nakrir dystir eftir, og hóast hann kanska er lítil, so er møguleikin enn til staðar.

**Dysturin í tølum:**
**Málskjúttar:**
Tjaldur: Sonja Gleðisheygg 6, Mona Langgaard 4, Sunrid Gleðisheygg 3 (3), Kristine Ellingsgaard 2, Beinta Joensen 1, Heidi Jacobsen 1
VÍF: Jacklin Durhuus 7 (2), Signhild Petersen 5, Nicolina Joensen 3, Fríða Johannesen 2, Ioana Rápa 1
**Brotskøst:**
Tjaldur 4, VÍF 2
**Útvísingar:**
Tjaldur 3, VÍF 2
**Dómarar úr Neistanum:**
Hjalmar Petersen og Kristian Johansen



*Ileana skræðir her í armin á Sólrun, og so vistu dómararnir bert ein veg at senda hana. Neistin má nú vera rumenan fyri uttan, tá tær í annað kvøld skulu spæla lokaluppgerð móti Kyndli*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

# Stigaleyst vikuskifti

*Annan dagin á rað skuldi VB royna at vinna sær tvey stig, og annan dystin á rað miseydnaðist hetta*

JÁKUP MØRK

Neistin-VB 26-22 (12-12)

Ivaleyst mundu tað vera mong, sum áðrenn kappingarársbyrjan væntaðu, at VB fór at verða eitt av teimum liðunum, sum rættuliga fór at gera um seg hetta kappingarárið.

Í byrjanini var eisini líkt til, at so fór at verða, men tá kappingin var nakrar vikur gomul, kom brádliga stígur í hjá teimum.

Í landskappingini hava tær ongantíð fingið gongd á aftur, men hinvegin hava tær í steypakappingini prógvað, at knotur eru í teimum, og í øllum førum er tað vist, at einki lið skal taka sigurin sum eina sjálvfylgju, tá VB stendur hinumegin miðlinjuna.

Eftir at tær leygardagin høvdu verið annar parturin í einum rimmar dysti, skuldu tær sunnudagin royna seg móti Neistanum. Vandi kundi kanska verið fyri, at tær so at siga høvdu brent alt krútið dagin fyri, og okkurt kundi eisini bent á, at so var, tí dysturin endaði við sigri til heimaliðið, sum sostatt helt fast um silvurvónirnar.

### Ileana koyrd út

Munurin millum liðini bæði var tó ikki serliga stórur sunnudagin. Allan fyrra hálvleik var gekk sera javnt á, og ber til at tosa um yvirvág, so var tað helst VB, sum hevði hesa.

Neistin helt tó alla tíðina fast í tiemum, og onkuntíð vóru tær eisini á odda við einum máli.

Javnleikur var eisini støðan, tá farið varð til hálvleiks, og í seinna hálvleiki gekk framhaldandi sera javnt á.

Fyri Neistan mundi tað helst kennast sum ein dyggur smeitur, at Ileana Manolescu tíðliga í seinna hálvleiki varð rikin av vøllinum, eftir at hon hevði togað í armin á Sórun, tá henda leyp inn móti málinum.

Í øllum førum hevur hon í fleiri dystum verið ein av stóru orsøkunum til, at Neistin hevur fingið stig við sær aftur, og tískil vóru tað helst fleiri, sum væntaðu tað ringasta, nú hon ikki kundi hjálpa liðfeløgunum seinastu 20 minuttirnar.

Hetta fekk tó ikki so stóra ávirkan á dystin, tí eftir útvísingina byrjaði Neistin brádliga at fara frá gestunum. Nú skal tað ikki sigast, at tað var útvísingin, sum gjørdi munin, tí helst var møðin eisini at farin at gera um seg hjá mótstøðuliðnum. VB hevði havt ein harðan dyst í Klaksvík leygardagin, og harumframt er hópurin ikki serliga breiður.

Hetta hevur eisini verið ein trupulleiki í nógvum dystum, tí stuðulsleikararnir fáa ikki tað neyðugu hvíldina undir dystinum.

So var eisini hesu ferð, og kundi Neistin tí tryggja sær sigurin í seinasta partinum av dystinum, har tær runnu VB liðið niður.

### Skert móti Kyndli

At Ileana fekk reyða kortið í hesum dystinum merkir eisini, at hon ikki verður tøk, tá Neistin mikudagin skal royna at basa grannunum úr Kyndli í einum dysti, sum helst fer at hava avgerandi týdning fyri, hvørjar heiðurskrónur tey bæði havnarliðini fáa.

Harumframt noyðast tær helst eisini at vera Biritu Wardum fyri uttan, tí hon mátti seint í dystinum fara út við skaða, so í løtuni sær einki serligt út hjá Neistanum.

Tó so, viljan hava tær altoftast við sær á vøllin, og at hesin ber langt er einki at ivast í. Higartil hevur tað í hvussu so er verið høvuðsorsøkin til, at Neistin framhaldandi hevur møguleikan fyri heiðursmerkjum, men um hetta eisini verður nóg mikið mikudagin fer tíðin at vísa.

**Dysturin í tølum**
**Málskjúttar:**
Neistin: Katrin á Neystabø 6 (4), Rúna Wardum 5, Birita Wardum 4, Marjun Jógvansdóttir 3 (3), Ileana Manolescu 3, Mildrið Jacobsen 3, Inga Danberg 1, Gunnleyg Berg 1
VB: Regina Rádó 5 (1), Arnleyð Krosslá 5, Gurið Mortensen 4, Sólrun Krosslá 4, Rannvá Augustinussen 3, Christina Holm 1
**Brotskøst:**
Neistin 8, VB 1
Útvísingar:
Neistin 2, VB 1
**Diskvalifikatión:**
Neistin 1 (beinleiðis reytt)
**Dómarar úr Stjørnuni:**
Geir Wardum og Carsten Andreasen



# Kaldir unglingar

*<u>Talv:</u> Unglingarnir úr Føroyum fingu sera góð úrslit í norðurlandakappingini í Finnlandi fyri skúlaungdómar. Og í liðkappingini er so javnt sum tað kann verða í toppinum í fyrstu deild undan síðsta umfarið.*

CARL ELI NOLSØE SAMUELSEN

Føroysku umboðini í norðurlandakappingini fyri skúlaungdómar, kunnu sum heild vera nøgd við avrík síni. Allir fingu stig, og nærum allir telvaðu yvir tað væntaða.

Ingolf Gaard og Rúni Dragaberg, báðir úr Klaksvík, luttóku í elsta bólkinum, teimum 17-20 ára gomlu, og her eydnaðist tað Ingolfi at fáa eitt stig av seks møguligum, meðan Rúni fekk hálvt stig.

Ì bólkinum fyri teimum 15-16 ára gomlu gekk tað sera gott hjá føroysku telvararnum. Martin Poulsen úr Havn fekk 50%, tað vil siga trý stig, og endaði mitt í røðini, meðan Hans Kristian Simonsen úr Kollafirði fekk hálvttriðja stig.

Olaf Berg úr Havn hevur altíð staðið seg væl í árligu norðulandakappingini, og í ár varð einki undantak. Hann fekk trý stig og endaði somuleiðis mitt í røðini í 13-14 ára bólkinum. Anders Nicolajsen, búsitandi í Danmark, fekk hálvt stig og endaði aftast.

Sjálvdan sær ein føroyskar gentur telva á høgum støði, men Miriam Olsen, sum eins og Anders er búsitandi í Danmark, fekk gott úrslit í Finnlandi. Hon telvaði í 11-12 ára bólkinum, og ognaði sær tvey stig.

Kappingin varð skipað soleiðis, at tveir teir bestu úr hvørjum norðurlandi umboðaðu ymsu bólkarnar. Úrslitið í ár hjá føroyingunum týður á, at vit saktans kunnu javnseta okkum við hini norðanlondini viðvíkjandi skúlatelving.

Støðuga venjingin unglingarnir fingu, áðrenn farið varð avstað, frá John Rødgaard gav uttan iva unglingunum íblástur og neyðuga sjálvsálitið.

Við á ferðini vóru ferðaleiðarin Martin Berg, og Flóvin Tór Næs, sum talvvenjari.



# B68 bjóðar til Coca–Cola Cup

*Komandi vikuskifti skipa toftamenn fyri innandura kapping í ítróttarhøllini í Runavík*

Í vaksnamannadeildunum eru teir nú av álvara farnir undir nýggja fótbóltsárið. Yngru deildirnar eru eisini farnar at hugsa um nýggja kappingarárið. Venjarar eru settir til flestu liðini, men á flestu støðunum eru teir ikki av álvara farnir undir uttandura venjingina enn.

Nógvir av yngru spælarunum eru sannir snillingar í innandura fótbólti. Hetta hevur verið sjón fyri søgn í mongu kappingunum, sum í vetur hava verið kring landið.

Og komandi vikuskifti fáa tey ungu aftur ein møguleika at royna seg í innandura kapping. Tað er B68, sum er fyrireikari. Teir bjóða dreingjunum at kappast í fimm bólkum. Talan er um dreingir, sum eru føddir frá 1984 og fram til teir, sum eru føddir í 1992 ella seinna enn so.

Genturnar fara at kappast í fýra bólkum. Tær elstu, sum hava loyvi at vera við, eru tær, sum eru føddar í 1983, og í yngsta bólkinum fara tær at kappast, sum eru føddar í 1990 og seinni enn so. Spælt verður við stórum málum.

Kappingin verður í ítróttarhøllini í Runavík leygardagin 4. og sunnudagin 5. mars. Síðsta freist at boða frá luttøku er í annaðkvøld. Tað ber til at boða frá luttøku millum klokkan 19 og 21. Boðast kann frá á telefon 448068, 448274 og 447644.

Kostnaðurin er 200 krónur fyri hvørt liðið. Á hvørjum liði eru fýra útispælarar og ein málverji. Hvørt liðið hevur loyvi at hava ein skiftisspælara. Øll liðini skulu hava rættulig fótbóltsnøvn.

Tað er Coca–Cola, sum stuðlar kappingini. Heiðursmerkir verða latin trimum teimum bestu liðunum í hvørjum bólki. Bestu liðini fáa harafturat t–blusur. Besti málskjúttin í hvørjum bólkinum fær ein fótbólt, og allir luttakararnir fáa Coca Cola.

# Klaksvíkingar vunnu útsetta dystin

CARL ELI NOLSØE SAMUELSEN

Í bygdahúsinum í Hvalvík, ið nevnist Streymahús, komu klaksvíkingar mansterkir inn á gátt. Talan varð greið, teir ætlaðu sær øll fýra stigini við tí í eyga at leggja seg ájavnt havnarmonnum í oddanum.

Dysturin endaði við stórsigri til klaksvíkingarnar, 3,5-0,5, men kundi eins væl koppa hinvegin. Allir átta telvarnir vórðu í tíðarneyð. Rani Nolsøe úr Klaksvík vann á fyrsta borði móti Martini Brekká. Martin stóð betur, men við eitt vendist fyrimunurin, Rani fekk frífinnu og hereftir varð tað hann sum royndi at vinna. Rani telvaði væl í tíðarneyðini og vann sannførandi.

Á øðrum borði varð eitt rættuliga spennandi talv millum Ólavur Simonsen úr Klaksvík og Finnbjørn Zachariassen. Ólavur vann, men í tíðarneyðini hevði Finnbjørn kontrakjansir í einari støðu har Ólavur stóð aktivari. Eftir tíðarneyðina fekk Ólavur rók, men Finnbjørn stóð somikið væl at hann royndi eina løtu aftrat, men Ólavur vann at enda. Hálva stigið hvalvíkingar fingu fekk Sámal Christiansen á triðja borði móti Steintóri Rasmussen. Steintór fór í álop og offraði bisp fyri tríggjar finnur og fekk heilt góða støðu, men Sámal fann allatíð bestu leikirnar og fekk at enda ævigt skák.

Tummas M. Anthoniussen og Bergur Magnussen hittust á fjórða borði. Sera javnt varð, men Tummas fekk tó lítlan fyrimun áðrenn tann herviliga tíðarneyðin byrjaði at ávirkað talvið. Tummas setti ein heldur ørkymlaðan Berg mát mitt í tíðarneyðini.

Hálvt stig til hvalvíkingarnar. Stormur og glopraregn yvir Hvalvík hendan dagin varð av sonnum merkt_

**Støðan undan síðsta umfar:**

| | |
|---|---|
| Havnin | 26 |
| Klaksvík | 25,5 |
| Kollafj. | 16 |
| Hvalvík | 15 |
| Sandavág | 13 |
| Toftir | 12,5 |

Allir dystirnir næsta vikuskiftið eru av stórum týdningini. Havnarmenn møta toftamonnum, sum stríðast undan niðurflyting, klaksvíkingar møta sandavágsmonnum, sum eisini stíðast undan niðurflyting og so er tað dysturin um triðja pláss millum hvalvíkingar og kollfirðingar.

Ómøguligt er at spáa um hvør vinnur deildina, men eitt er greitt; havnarmenn eru hálvt stig framanfyri og kunnu tí sjálvir avgera føroyameistaraheitið.

Síðsta umfar verður í kommunuskúlaauluni leygardagin 4. mars kl. 12.00. Hetta verður eitt felagsumfar, har allar dystirnir í deildunum verða telvaðir undir somu lon.

# Kasparov tapti

*Heimsmeistarin mátti herfyri lúta móti hálendinginum, Jeroen Piket*

CARL ELI NOLSØE SAMUELSEN

Í internetkapping sum varð herfyri eydnaðist tað hálendinginum Jeroen Piket at basa sjálvan Gary Kasparov í finaluni. Piket vann 1,5-0,5.

Nógvir sterkir telvarar luttóku í kappingini, ið nevndist Kasparov Cup. Nakrir sótu við hús og telvaðu, meðan aðrir telvaðu alment.

**Ein sera sterk telda varð við, men hon varð tikin úr kappingini vegna tekniskar trupulleikar. Nógv vilja vera við, at tað møguliga var Kasparov, sum fekk sparkað telduna úr kappingini, tí hon var ov sterk til hansara. Men hetta eru bert gitingar.**

STEYP OG HEIÐURSTEKIN
Nógv nýtt heimkomið
Vit hava stórsta úrvalið innan steyp og heiðurstekin í Føroyum.
Vit skulu eisini gera vart við at vit hava stórar møguleikar innan gravering av steypum og heiðursmerkjum. T.d. kunnu vit gravera búmerki hjá tykkum og annars alt tað vanliga.



Vit síggjast í 3-aranum
NB. Vit gravera eisini navnaskeltir v.m. til el-talvur, hurðar o.a.
3arin
SMS
Tel. 31 98 20 - 31 06 06
Fax 31 49 55
E-mail: tryarin@post.olivant.fo
Sosialurin - 311820